**Sosialurin varpar á hesum síðum ljós á spurningin um ES í sambandi við, at ráðstevna um ES var í Norðurlandahúsinum fríggjadagin.**



# ES má finna semju við Føroyar, Ísland, og Noreg

**- Fiskivinnupolitikkurin hjá ES kemur ikki at yvirliva í tí líki, sum hann er, sigur Óli Samró, búskaparfrøðingur. Hann væntar at ES fær eina regionala ella desentrala fiskivinnuskipan innan eitt áratíggju**

ES OG FØROYAR
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

– Um Ísland, Noreg, og Føroyar fáa eitt tættari tilknýti til ES, og um hesi trý londini kunnu semjast um, at tey vilja hava ávirkan á fiskivinnupolitikkin, so fáa tey tað. Tað sigur seg sjálvt, at ES má finna eina semju við hesi londini um fiskivinnupolitikkin, sigur Óli Samró, búskaparfrøðingur.

Fiskivinnupolitikkurin hjá ES byggir upp á lond, sum eru limir í ES. Hesi londini avgeva rættin til tilfeingi til ES at umsita sentralt í Brússel. Nøgdin sum kann fiskast verður stýrd úr Brússel, men tú varðveitir tey fiskirættindi, sum tú hevði áðrenn innliman í ES.

Óli Samró sigur, at fiskivinnupolitikkurin hjá ES er ólogiskur. Búskaparfrøðingurin væntar, at fiskivinnupolitikkurin hjá ES í framtíðini verður býttur upp í ymisk øki. Til dømis verður Miðalhavið eitt øki, Suðuratlantshavið eitt, Eystursjógvurin eitt, Norðsjógvurin eitt, Norðuratlantshavið eitt, og so framvegis.

– Ein regionalur ella desentralur fiskivinnupolitikkur hevði verið tað mest logiska. Tað er ongin logiskur samanhangur í at umsita tvey so ymisk fiskivinnuøki sum til dømis Ísland og Grikkaland undir sama fiskivinnupolitikki. Politikkurin má verða regionalur ella desentralur, sigur Óli Samró, búskaparfrøðingur.



*Ongin kann til dømis finna samanhang millum fiskivinnu í Grikkalandi og í Íslandi, sigur Óli Samró, búskaparfrøðingur, um fiskivinnupolitikkin hjá ES*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Vinnuhúsið:

## Tingini kunnu boyggjast

- Tað er týdningarmikið, at tað er skipað fyri hesari ráðstevnuni, tí vit mugu fáa orðaskiftið um ES upp á eitt hægri støði. Tað er gott, at vit fáa sett hol á eitt kjak um teir ítøkiligu møguleikarnar, sum vit hava í mun til ES. Tað má ikki verða eitt kjak uttan nakað innihald. Tað má verða ítøkiligt, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum.

- Vit hava fingið lýst nakrar møguleikar, og eg haldi íslendingurin lýsti sera væl, hvønn týdning tað hevur havt fyri Ísland at vera við í EBS. Tú hevur flutt Ísland frá at vera eina nokkso lukkaða fiskivinnutjóð til at verða eitt modernað globalt samfelag við handilssambondum allastaðni. Føroyingar standa nokk har, sum Ísland stóð tá. Hava føroyingar fyrst sett sær eitt mál um, hvat teir sjálvir vilja, so er ikki vist, at tað eru nakrar forðingar. ES hevur eisini víst á, at tingini kunnu boyggjast, og sjálvt lítil lond sum Malta hava fingið ES-limaskap, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum.

**-hkm**

Sambandsformaðurin:

# Vit eru ein bananrepublikk

**- Vit hava í dag tað ringastu avtaluna við ES, sum tað kann hugsast at hava, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum**

ES OG FØROYAR
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

- Eg haldi, at tað er gott at fáa nakrar meiningar um ES. Eg haldi, at vit síggja nú, hvussu átroðkandi tað er, at føroyingar fáa eitt veruligt kjak um ES; hvat tað er fyri nakað, og hvat fyri møguleikar eru fyri Føroyar og fyri einari framtíðar vinnu. Tað eru nøkur scenariur, sum eru sett upp, ið eru áhugaverd. Tað vísir bara tað, at ES er ikki ein statisk skipan. Tað vil siga, at tað eru nakrir møguleikar, sum tú kanst velja ímillum, um tú fert inn í eitt tættari samstarv við ES, sigur Kaj Leo Johannesen.



*- Vit kunnu ikki longur goyma okkum fyri ES. ES er har, ES er okkara størsti handilspartnari í dag, og vit eru noyddir til at fyrihalda okkum til tað, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Føroyar eitt land í Afrika

- Tríggir møguleikar vórðu nevndir. Eitt er tann tjóðskaparligi spurningurin. Skulu vit fara inn sum ein partur av Danmark, ella skal tað verða sum fullveldisríki. Tað triðja er at gera tað sum eitt nú Ísland og Noreg gera tað við EFTA og við eini EBS-líknandi samstarvsavtalu. Tað gevur sjálvandi eisini nakrar møguleikar. Vit kunnu í øllum førum staðfesta, at vit í dag hava tað allar ringastu avtaluna, sum tað kann hugsast at hava við ES. Vit eru tað, sum eg havi nevnt fyrr, ein bananrepublikk. Vit kunnu samanbera okkum við nógv av teimum afrikonsku londunum. Tí støðuni mugu vit syrgja fyri at sleppa okkum burturúr sum skjótast, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum.

### Bert partvís avtalur við ES

- Vit taka ikki lut í nøkrum av teimum fýra frælsunum, og vit hava bert partvís avtalur um vørur - alt hitt hava vit onga avtalu um yvirhøvur. So tað eru øll hesi fýra frælsini, sum liggja opin fyri okkum, og tað er tað, sum vit skulu fara at hyggja alvorliga eftir, soleiðis at vit ikki verða eftirbátar. Eg síggi, at sum tíðin fer, so blíva tað fleiri og fleiri politikarar, sum eru nógv meira positivir yvirfyri ES. Longu nú eru viðmerkingar frá politikarum, at vit kunnu ikki longur stinga høvdið í sandin, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum.

Djurholm:

## EFTA politiskt best møguleika

- Tað áhugaverda við ráðstevnuni er, at vit síggja og fáa lýst, hvørjar møguleikar vit hava. Tað eru tríggir møguleikar: tú kanst gerast limur í ES sum er, tú kanst gerast limur sum sjálvstøðugt land, ella tú kanst gerast limur í EFTA, og eg trúgvi, at EFTA er tann møguleikin, sum politiskt hevur best møguleika. Men eitt eri eg so sannførdur um: Vit mugu taka henda spurningin í størsta álvara, tí at marknaðaratgongdin, tað verður spurningurin um okkara framtíð, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

**-hkm**